VIÐMERKINGAR

Pappageykaskról ella álvaratos

Harry á Lakjuni
Fuglafirði 19/3

Tað er bara ein skipari á Polo, segði skiparin á Polo á sinni, og rætt hevði hann.

Men kortini er tað mangan gott hjá einum skipara at kunna ráðføra seg við stýrimenninar, og ofta og týtt kunnu ráðini frá stýrimanninum - ella um tey so komu av dekkinum - vera so góð, at skiparin broytir hugsan um eitthvørt, hvat tað so skuldi verið. Men tá avgerðin skal takast, er skiparin suverenur!

Í fjør royndi eg fyri fyrstu ferð, at vit vóru tveir skiparar umborð á sama skipi. Vit vóru undir polskum flaggi. Alt gott um tann polska flaggskiparan, tí hann greiddi sína uppgávu til lítar. Men eg dugdi at síggja, hvussu ótrúliga skjótt konfrontatiónir kundu uppstaðið. Tað gjørdi tað kortini ikki okkara millum, sjálvt um tað onkuntíð prutlaði undir lokinum. – Men eitt annað er, at tá ið tú bara ert fiskiskipari, so hevur tú ikki ta juridisku ábyrgdina, og tí kann vandi vera fyri, at tú gerst líkasælur yvir fyri lógum og reglugerðum, sum eru galdandi, har fiskað verður.

Og hevur hetta ikki júst verið standard trupulleikin í Føroyum í øldir, at vit bara hava verið fiskiskiparar, meðan danir hava verið flaggskiparar? - Og nú vit kanna 80-ini, so er neyvan nakað at ivast í, at høvuðsorsøkin til, at tað gekk, sum tað gekk, var, at politikarar og onnur lótu seg freista til eina fyrilitaleysa peninganýtslu, og til síðst gekk tað so galið, at vit eisini mistu "fiskiskiparamandatið". Tá vóru tað danir, sum søgdu okkum, hvar og hvussu vit skuldu fiska, við kvotaskipanum o.ø.

At vit loksins fyri trimum árum síðani fingu eitt landsstýri, sum setti sær fyri at koma burtur úr hesi óhaldbaru støðu og setti sær sum mál at fáa fullan suverenitet yvir hesum landi, er alla æru vert. - Landsstýrið fór grundiga til verka, lýsti málið sera væl frá øllum síðum og var væl fyrireikað til at møta donsku stjórnini. Men tann kalda móttøkan og arrogansan, sum danir hava víst landsstýrinum, er undir alt lágmark.

Her kemur ein vælmeint og væl fyrireikað føroysk samráðingarnevnd í fullum álvara og leggur eitt skilagott samráðingarupplegg fyri donsku stjórnina, - men einasta reaktión, føroyingar fáa, er, at revolvarin verður settur fyri pannuna á teimum, og forsætisráðharrin sigur: "Fýra ár, fýra ár". Ja, sum um hann ikki dugdi at siga annað - sum ein pappageykur, ið tekur orðini upp í saman: "Fýra ár - fýra ár - fýra ár".

Samráðingargrundarlagið er ófrávíkiligt, sigur Nyrup. Hvussu kann eitt samráðingargrundarlag vera ófrávíkiligt? - Tað má vera ein mótsøgn í hugaheiminum á teimum flestu. Hví sigur Nyrup ikki tingini við teimum røttu orðunum, at her als ikki er talan um samráðingar, men at tað ultimatum, hann hevur sett føroyingum, er ófrávíkiligt. Jú, stundum lata teir donsku politikararnir seg í ta demokratisku maskuna og látast, sum teir hava virðing fyri okkara ynskjum, og lata so nøkur vøkur orð falla, men skjótt stinga teir imperialistisku hógvarnir undanaftur.

Hevði tann danski forsætisráðharrin bara havt eitt lítið sindur av veruligari virðing fyri tí føroyska fólkinum, ja, so stóð hann ikki bara og hótti og rópti sum ein pappageykur: "Fire år, fire år". Nei, so fór hann sum ein rættur statsmaður í fólkatingið og helt eina virðiliga røðu fyri fólkatinginum og tí danska fólkinum, har hann rósti føroyingum fyri teirra áræði og vilja til at klára seg sjálvar. Røðan kundi t.d. ljóðað nakað soleiðis:

Harra formaður!

Nú fer tíðin at nærkast, at Føroya landsstýri kemur higar til Keypmannahavnar at samráðast við okkum um framtíðarstøðu Føroya. Føroyar eru hvørki á Fyn ella Langeland. Hyggja vit í danmarkarkortið, finna vit ikki Føroyar. Føroyar eru ein oyggjabólkur í Norðuratlantshavinum, og fjarstøðan hiðani úr Keypmannahavn til Tórshavnar, sum er høvuðsstaður í Føroyum, er umleið 1300 km. - Fólk hava búleikast har í kanska 12-1300 ár, og føroyingar eru av írskum og norskum uppruna, sigst, so helst er lítið danskt blóð í æðrunum á hesum fólki. Eisini tosa føroyingar egið mál og hava sína egnu mentan, so vit síggja, at her er talan um eina serstaka tjóð, - eitt land og eitt fólk, sum av røttum hevur allar fyritreytir at kallast ein tjóð.

Sum vit øll vita, Harra formaður, so hava vit, danir, havt yvirvaldsrættin yvir Føroyum í umleið 600 ár, men nú ið landsstýrið kemur higar í næstu viku, eru høvuðsørindi teirra at leggja fram fyri stjórnina uppskot um, at teir sjálvir taka yvirvaldsrættin í sínum egna landi, soleiðis at Føroyar gerast ein suverenur statur. - Væl hava vit í nøkur ár goldið ávísa upphædd til Føroyar, sum natúrligt er, tá ið ein hevur yvirvaldsrættin í øðrum landi, tí har ein valdar, skal ein eisini gjalda, men tá ið tað føroyska landsstýrið nú vil greiða hesi viðurskifti sjálvt, er tað alla æru vert.

Og her vil eg leggja dent á, Harra formaður, at tað ikki er soleiðis, sum óndar tungur vilja vera við, at landsstýrið vil hava danir at fíggja sitt sjálvstýri. Løgmaður hevur kunnað meg um uppskot landsstýrisins, og har er einki, sum bendir á tað. Heldur er tað beint tvørturímóti. Landsstýrið ætlar eftir rættiliga stuttari tíð at minka ríkisstuðulin niður í einki fyri síðan at fíggja sitt egna sjálvstýri. Tí, sum landsstýrið so skilagott sigur, so avlagar ríkisveitingin í stóran mun tann føroyska búskapin - og tað skilja vit, sum dagliga fáast við politikk, sera væl, at hetta kann hava óhepnar avleiðingar.

Sjálvur haldi eg, at uppskot landsstýrisins er sera skilagott! Hvør vil ikki ráða í sínum egna húsi? Er tað nakað, sum kann vera meira natúrligt og rætt enn tað? Hvat er tað land, sum vil verða stýrt av øðrum ? - Fjarstøðan hiðani og til Moskva er ikki so nógv longri enn fjarstøðan millum Tórshavn og Keypmannahavn, men hvør av okkum hevði latið sær lyndað, at tað var tað russiska tjóðartingið, sum hevði avgerðarrættin yvir donskum málum, t.d. verjuog fíggjarmálum? - Og eg kundi hugsað mær, Harra formadur, at biðið tey í hesum høga tingi, sum høvdu viljað, at so var, um at rætta hondina upp. (Kvirt í salinum - eingin rættir hondina upp! Ella var ikki ein hond har? Jú, mín sann, haldi eg, at eg sá ein føroyskan javnaðarmann rætta hondina upp - men hann tekur hana til sín aftur, tá ið hann sær, at eingin annar hevur hondina uppi. Mundi hann skammast? - Ella er yvirhøvur skomm skapt í honum?)

Nei, harra formaður, eg haldi ikki, at nakar av okkum hevði viljað livað undir slíkum umstøðum, og hví skulu vit so rokna við, at onnur vilja gera tað? – Vit, sum hava hug at breggja okkum av, at vit hava hjálpt øðrum tjóðum at fáa sjálvstýri, t.d. teimum baltisku londunum. Kunnu vit vera so dupulmoralskir, at vit ikki vísa uppskoti føroyinga alla vælvild?

Og hvussu var, tá ið okkara egni suverenitetur var í vanda og varð tikin frá okkum? Hava vit gloymt hin myrka dagin, 9. apr. 1940 - helst hin daprasti í Danmarkar søgu, tá ið fremmant hersetingarvald rændi frælsið frá okkum? - Hava vit gloymt, Harra formaður, at tað vóru aðrir, ið vunnu okkum frælsið aftur, og at fremmant blóð mátti flóta? Og hava vit gloymt, at partur føroyinga at veita teimum hersettu londunum frælsið aftur ikki var minni enn so, at hin stóri statsmaðurin, Churchill, ikki læt tað fara aftur við borðinum, men takkaði í takkarøðu síni eftir kríggið hesi lítlu tjóðini fyri norðan fyri tað bragd, føroyingar gjørdu, tá ið teir sigldu vandasjógv og settu lívið í váða øll krígsárini, siglandi millum minur og hóttir av bumbuflogførum. Hetta var lívsneyðugt fyri bretar, so teir kundu fáa fisk á borðið hesi truplu ár.

Og hava vit gloymt hin dagin, tá ið vit fingu okkara frælsi aftur? - hin maidagin í 45, tá ið Mountgomery generalur sigursælur koyrdi gjøgnum gøturnar her í Keypmannahavn og varð fagnaður við blómum og gleðisrópum, tí nú var tað dýrasta, sum ein familja, eitt fólk og ein tjóð kann missa, afturvunnið: frælsið! – Ja, Harra formaður, hava vit gloymt - hava vit gloymt at virðismeta hetta frælsi, sum varð vunnið okkum aftur, og sum ikki er nakar sjálvsagdur rættur, men heldur ein dýrgripur, sum vit hava fingið í varðveitslu, og sum enn einaferð kundi verið rændur frá okkum.

Og vit, sum bera frælsi og brøðralag í skjøldri okkara, hvat kunnu vit annað enn vísa hesari brøðratjóð okkara ta vælvild og tann sóma, hon hevur uppiborið í hesum máli!

Takk fyri, Harra formaður.

Standard sáttmáli í oljuvinnuni

Eitt av evnunum, sum kunna var um á ráðstevnuni í Aberdeen, var ein sáttmáli, ið er ætlaður til vanligar veitingar innan oljuvinnuna í føroyskum øki

Í 1999 tók oljubólkurin hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag stig til, at funnið var fram til eina sáttmála- fyrimynd, ið kundi nýtast til tær vanligastu veitingarnar í einari komandi oljuvinnu.

Orsøkin til hetta stig var, at sáttmálar millum útbjóðarar og veitarar innan oljuvinnuna, bæði eru rúgvusmiklir í vævi og víkja frá vanligum kendum reglum innan keyp og sølu í øðrum vinnugreinum. Eisini kundi staðfestast, at ymisku oljufeløgini og stóru undirveitarir teirra, brúka ymisk sáttmálasnið.

Arbeiðsgevarafelagið metti, at slíkir sáttmálar, og enntá fleiri ymiskar útgávur, kundu gerast tungir fyri smáar føroyskar fyritøkur. Tí ynskti felagið at fáa eina sáttmálafyrimynd, sum øll oljufeløgini játtaðu at brúka, skrivar Vinnuhúsið.

Fyrst í mars

Gongd kom ikki á hetta arbeiði fyrr enn oljufeløgini á heysti 2000 funnu saman í ein samstarvsbólk - tað sum nú eitur FOÍB. Síðani hava umboð fyri oljubólkin hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag og oljufeløgini hittst regluliga á arbeiðsfundum, og fyrst í mars fekst semja um ein sáttmála.

Sáttmálin fæst á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum. Fyribils er hann bert á enskum, men hann kemur so skjótt sum gjørligt í einari føroyskari útgávu, og eisini er ætlanin at geva útgreinandi viðmerkingar til einstøku greinirnar.

Sáttmálin er ætlaður til tær vanligastu veitingarnar í einari komandi oljuvinnu, fyri sokallaðar »Low risk onshore services« skrivar Vinnuhúsið.

Stórkapping í rútmiskum fimleiki

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin 24. mars kl. 15.00 verður tann árliga stórkappingin í rútmiskum fimleiki í ítróttarhøllini í Runavík fyri tey yngru liðini.

Kappast verður í tveimum aldursbólkunum:
pinkur
smágentur

Fimleikafeløgini ið eru við eru:
Havnar Fimleikarfelag
Fimleikafelagið Ljósið
Støkk
og Fok.

Hjá pinkum eru fýra lið, og smágentum trý lið, sum skulu kappast móti hvørjum øðrum. Pinkur kappast bert í einari seriu, meðan smágenturnar gera eina fría seriu og eina við amboðum. Í ár hava smágentur ringar sum amboð.

Gestaliðini á sýningini verða gentu- og kvinnuliðini úr HF og Ljósinum.

Í stuttum kann sigast, at dømt verður bæði tøkniligt, har serligur dentur verður lagdur á torleikastøðið, og listarligt, har mest verður hugt eftir koreografiini.

Byrjað verður kl. 15.00 og kappingarnar verða í hesi raðfylgju:
pinkur
smágentur frí íðkan
smágentur amboð

Nýggjur sjókaðal fyri 600 mill

Føroya Tele og íslendska telefyritøkan Landssími Íslands hava í nøkur ár havt í umbúnað at leggja ein nýggjan samskiftiskaðal á havbotnin millum Ísland, Føroyar og Skotland. Hann er mettur til at kosta upp ímóti 600 mill. kr. Nú verður samráðst við hetlendingar og oljufeløg um at gera eina felags verkætlan. Góðu útlitini fyri oljuvinnu á Atlantsmótinum seta eisini størri krøv til samskifti

SAMSKIFTI
Jan Müller



Hjallgrím Hentze, deildarstjóri hjá Føroya Telé her saman við Jeff Goddard frá Shetlands Islands Council, tá teir umrøddu tørvin á at menna samskiftismøguleikarnar á Atlantsmótinum.

Mynd Jan Müller

Tá Jeff Goddard frá Shetland Islands Council vitjaði í Føroyum í herfyri vóru ørindi hansara eisini at umrøða telesamskiftið millum Føroyar og Skotland Hetlendingar arbeiða við eini verkætlan at leggja ein ljósleiðarakaðal millum Hetland, Orknoyggjar og Skotland.

-Vit hava í nøkur ár havt samband við Landsími Íslands og Føroya Tele, og eru tí vitandi um, at bæði íslendska telefelagið og Føroya Telé eru í ferð við eina líknandi ætlan at leggja ein fiburoptiskan kaðal millum Ísland, Føroyar og Bretland. Vit hyggja tí eftir, um tað ber til at skipa so fyri, at hesar báðar verkætlaninar kunnu gagna hvørjari aðrari. Vit hava umrøtt møguleikan fyri heldur at hava eitt felags projekt enn tvey ymisk sigur Jeff Goddard, sum í sínum dagliga arbeiði umsitur pengarnar í fleiri av teimum stóru íløgugrunnunum í Hetlandi.

Jeff Goddard sigur, at tað frá politiskari síðu í Hetlandi er púra greitt, at tað er alneyðugt fyri hetlendska samfelagið er at fáa til vega ein munagóðan samskiftismøguleika úr Hetlandi til meginlandið. Tí hava politisku myndugleikarnir gjørt av at nýta nakrar av oljuinntøkunum til at tryggja, at hetlendingar ikki verða eftirbátar í fjarðskiftishøpi.

Kannað havbotnin

Føroya Telé og íslendska telefyritøkan Landssími Íslands hava í nøkur ár havt í umbúnað at leggja ein nýggjan samskiftiskaðal á havbotnin millum Ísland, Føroyar og Skotland. Hann er mettur til at kosta upp ímóti 600 mill. kr. Kanningarnar eru longu farnar í gongd og seinasta summar kannaði eitt serútgjørt skip, Commandor Jack, havbotnin millum Føroyar og Ísland. Eisini partar av leiðini suðureftir vórðu kannaðir í fjør heyst. Hesar seinnu kanningarnar vóru framdar av oljufelagnum BP sum í ein ávísan mun eisini luttekur í ætlanini. Kanningarnar suðureftir halda áfram í vár.

Føroyar og Ísland hava tað í felag at høvuðssamskiftið við umheimin gongur um Cantat-kaðalin. Bæði londini hava fylgisveinasamskifti at taka til, um okkurt er áfatt við Cantat kaðalinum, men fylgisveinaorkan er og verður ein avmarkað og sera dýr loysn, sum ikki í framtíðini kann nøkta tann alsamt vaksandi tørvin á samskiftisorku. Ásannandi at samfeløgini bæði koma at liggja lamin uttan eitt nøktandi fjarskiftissamband við umheimin hava feløgini bæði tikið stig til at kanna møguleikan fyri at leggja ein nýggjan kaðal til Evropu.

Ætlanin hevur nøkur ár á baki, og var tað undir fyrireikingunum til kanningarnar, at samband kom í lag við hetlendsku myndugleikarnar, sum longu tá høvdu tikið avgerð um, at eisini Hetland skuldi hava ljósleiðarasamband við umheimin fyri ikki at verða eftirbáta.

Tað er stóri eftirspurningurin á samskifti millum lond, sum er høvuðsorsøkin til at farið er undir at kanna umrøddu verkætlan. Verandi Cantat-kaðal, sum í løtuni er álitið, hevur víst seg at verða ov svikaligur, og orkan hjá Cantat verður sum frálíður ov lítil. Henda óhapp má dúvast uppá fylgisveinasamskifti, og tað er alt ov dýrt í longdini umframt, at tað nøktar ikki vaksandi eftirspurningin. Krøvini til bæði telefon- og internettænastu koma at vaksa nógv í framtíðini, og haraftrat kemur, at ein komandi oljuvinna á Atlantsmótinum fer eisini at seta sín krøv til samskiftið.

Oljuvinnan setir krøv

Føroysk-íslendski kaðalin skal eftir ætlanini liggja tætt við verandi oljukeldurnar Foinaven og Schiehallion og hetta hevur fingið eitt nú oljufelagið BP at vísa honum áhuga. Hugsandi er at oljufeløgini í framtíðini fara at kunna gera ein størri part av arbeiðinum á oljufeltinum úr landi. Og tað fer at seta størri krøv til orkuna á eitt nú samskifti.

Einaferð í framtíðini kann hugsast, at allur útbúnaðurin í sambandi við oljuframleiðslu fer at liggja á sjálvum havbotninum. Hugsandi er tí eisini, at alt fer at verða fjarstýrt úr landi, og tað setir heilt nýggj krøv til samskiftisorkuna.

Spurningurin er tí, um oljufeløgini vilja vera við í verkætlanini at leggja eina nýggjan samskiftiskaðal á havbotnin. At binda oljupallarnar og útbúnaðin á havbotninum uppí ein slíkan millumlandakaðal økir nógv um kostnaðin sigur Hjallgrím Hentze, deildarstjóri á Føroya Tele. BP er við í fyrstu kanningarfasuni, har teir luttaka við at gera partar av kanningini millum Føroyar og Hetland.

Hann sigur, at teir og íslendingar hava nú í eina tíð arbeitt við eini ætlan at leggja ein nýggjan kaðal úr Íslandi um Føroyar og til Europa. Har er stytsta leiðin um Ongland. Og her er tað so, at ætlanin at gera líknandi kaðal millum bretsku oyggjarnar og Skotland kemur inn í myndina.

Spurningurin er so nú, hvussu eitt samarbeiði við eitt nú hetlendingar, skotar og oljufeløg kann skrúvast saman: um hvussu man kann fáa nakað burtur úr saman og harvið kanska sleppa bíligari við at fara til Hetlands við kaðalinum heldur enn at fara beinleiðis til Skotlands.

Hjallgrím Hentze sigur, at tað í framtíðini er av stórum týdningi at hava tvey kaðalsambond. Fylgisveinaorkan er eisini ov lítil og kostnaðarmikil. Sum er hevur Føroya Tele havt trupulleikar við orkuni á eykasambandinum um fylgisvein, og krøvini til tað verða størri og størri, tí serliga internetorkan veksur so skjótt.

-Kunnu vit spara nakað við at brúka hetlendingar og kunnu teir tjena nakað við at brúka okkum, so vil eitt samstarv við hetlendingar verða ein skilagóð leið heldur Hjallgrim Hentze, sum eisini vísir á, at møguleikin fyri at leggja báðar ætlaninar saman til eina hevur verið havdur á lofti.

Uttan mun til hvussu annars verður farið fram, er gjørt av at Føroya Tele og LandSimi ikki verða teir einastu, sum koma at luttaka í verkætlanini. Hartil er verkætlanin alt ov kostnaðarmikil. Eisini kappingarneytarnir hjá fyritøkunum báðum í Íslandi og Føroyum fara at verða bodnar við. Harumframt verða bankar og aðrir áhugaðir eisini bodnir uppí hesa verkætlanina, soleiðis at tað ber til at fíggja hana. Enn eru vit so bara í kanningarfasuni. Kanningin av havbotninum millum Ísland og Føroyar er longu gjørd, og leiðin suðureftir verður gjørd nú í ár.



Verandi Cantat-kaðal, sum í løtuni er álitið í samskiftinum, hevur víst seg at verða ov svikaligur, og orkan hjá Cantat verður sum frálíður ov lítil. Henda óhapp má dúvast uppá fylgisveinasamskifti, og tað er alt ov dýrt í longdini umframt at tað nøktar ikki vaksandi eftirspurningin. Her stóru parabolurin hjá Føroya Telé.